Nr. 12 - 20. januar 2004 Sosialurin 19

# Valshow í Norðurlandahúsinum

## Bárður Persson, 33 ár:


*Mynd: Bárður Persson*

*Hvussu dámdi tær fundin?*
Mær dámdi sera væl fundin, og tann flokkurin, sum eg eri best við, kláraði seg væl. SVF gjørdi eitt gott arbeiði. Pallurin var flottur og fólk vóru væl uppløgd.

*Fekk fundurin teg at broyta støðu viðvíkjandi atkvøðu tíni?*
Nei, tað gjørdi fundurin ikki. Fyri fjúrtan døgum síðan bleiv eg tjóðveldismaður takkað verið einari lýsing hjá Sambandsflokkinum, har teir ynsktu fullveldinum farvæl. Tað var sum at siga farvæl við eina tjóð. Lisbeth L. Petersen, takk fyri at tú umvendi meg til ein tjóðveldismann.

*Hvør fær tína atkvøðu?*
Høgni Hoydal

## Hallur av Rana, 19 ár



*Hvussu dámdi tær fundin?*
Eingin nyttaði nakað uttan Johan. Nei tvætl, Javnaðarflokkurin og Tjóðveldisflokkurin gjørdu eitt gott arbeiði í kvøld eisini.

*Fekk fundurin teg at broyta støðu viðvíkjandi atkvøðu tíni?*
Nei, tað gjørdi hann ikki.

*Hvør fær tína atkvøðu?*
Sí eftirnavn mítt

## Hjørdis Heindriksdóttir, 38 ár



*Hvussu dámdi tær fundin?*
Hann var rímiliga góður. Johan í Kollafirði var stuttligur. Nógvur floksformenn kláraðu seg væl, men mær dámdi best Høgna Hoydal.

*Fekk fundurin teg at broyta støðu viðvíkjandi atkvøðu tíni?*
Nei

*Hvør fær tína atkvøðu?*
Tjóðveldisflokkurin

## Henning Olsson, sjónvarpsmaður fyri DR



*Hvussu dámdi tær fundin?*
Eg kann sjálvandi ikki siga nakað um innihaldið av fundinum, tí eg skilji ikki føroyskt. Men eg upplivdi ein fantastiskan valhýr, har fólk vóru aktiv og lurtaðu væl eftir. Júst sum í Danmark vóru floksviðhaldsfólk millum áskoðarnar og klappaðu eyka hart fyri sínum egnu.

Tað bilar ikki. Tað hoyrir til. Valstríð skal ikki vera keðiligt, og tað var tað so avgjørt heldur ikki inni her í kvøld. Tykkara versión av Jacob Haugaard hevði eitt øgiligt tak á áskoðarunum. Eg eri vísur í, at hann hevur framtíðina framman fyri sær. Ikki sum politikkari, men sum stand up sjónleikari. Hann fær sítt egna show onkran dagin.

**Stóri valfundurin í Norðurlandahúsinum sunnukvøldið var eitt satt valshow. Við einari UG framførslu prógvaði Johan í Kollafirði og Hin stuttligi flokkurin, at politikkur kann vera alt annað enn keðiligur**

VALFUNDUR Í NORÐURLANDAHÚSINUM
*Kristian E. Andersen*
*kristian@sosialurin.fo*
*Myndir: Jens Kristian Vang*

Ein fullsettur, til tíðir kókandi, salur í Norðurlandahúsinum var sunnukvøldið karmur um ársins valshow. Stóri endabresturin, har floksformennirnir fáa seinasta møguleikan at vinna sær og flokki sínum neyðugu atkvøðurnar, var merktur av einari stuttliga og lívligari atmosferu, ikki minst takkað verið Hinum stuttliga flokkinum. Við einari UG framførslu prógvaði Johan í Kollafirði, at politikkur kann vera alt annað enn keðiligur, og neyvu, stuttligu orðingar hansara stóðu sum ein fín andsøgn til tað meira seriøsa, politiska kjakið, sum kollfirðingurin lat hinar floksformennirnar um. Umframt hetta var áskoðarfjøldin óvanliga lívlig, og herróp og lógvabrestir mundu ongan enda fingið, tá ávísir politikkarar høvdu havt orðið.


*Áskoðarafjøldin var óvanliga lívlig í Norðurlandahúsinum sunnukvøldið*








*Tá tað er seinasti møguleikin at vinna sær og flokki sínum neyðugu atkvøðurnar, er týdningarmikið við álvarsemi*



*Við einari UG framførslu prógvaði Johan í Kollafirði, at politikkur kann vera alt annað enn keðiligur*

